# 9,2 mió. kr. í lánsgjaldi í 2009

JAN CHRISTIANSEN
býráðslimur



**Nú skulu bankarnir aftur hava sín part av skattinum**

Fyrsta útkastið til fíggjarætlanina fyri 2009 hjá Tórshavnar Kommunu er komið. Tíverri prógvar útkastið, at verandi samgonga millum Javnaðarflokkin og Tjóveldið, er farin sera lætt um borgarans skattakrónur. Eg havi fleiri ferðir víst á, at um ikki vend kom í fíggjarpolitikkin hjá Tórshavnar Kommunu, so komu vit aftur í ta støðu, at lánibyrðan kom at niðurbinda kommununa. Tann støðan er tíverri skjótt veruleiki.

Undanfarnu býráð gjørdu eitt megnar arbeiði við at gjalda niður skuld, og tað eydnaðist so mikið væl, at kommunan gjørdist skuldarfrí. Skattapeningurin kom aftur borgarunum tilgóðar, heldur enn bankunum. Komandi ár skal kommunan aftur at gjalda fyri skuld - 9,2 mió.kr. -, men tað er bara byrjanin, um verandi samgonga framhaldandi sleppur at ráða fyri borgum í høvuðsstaðnum.

**Fyrisitingin økt við 60%**

Kommunan hevur seinastu nógvu árini havt fíggjarorku til at gera íløgur fyri umleið 100 mió.kr. um árið, og um rætt hevði verið atborið, so hevði henda upphædd kunna verið økt til 150 mió.kr. Kommunan var skuldarfrí, og skattainntøkurnar hava verið hægri enn nakratíð. Men heldur enn at reka ein varnan fíggjarpolitikk, tá samfelagið er yvirupphitað, hevur samgongan økt munandi um allar útreiðslupostar og hevur harvið koyrt bensin á bálið. Bara kostnaðin av fyrisitingini av kommununi hevur samgongan økt úr 36.3 mió.kr í 2004 til 59,1 mió.kr. í 2009. Tað er ein øking á 22,8 mió.kr. eftir fimm árum, ella ein øking á yvir 60%.

**Eingin raðfesting av íløgum**

Stórar útbyggingar standa fyri framman og er sera umráðandi, at kommunan raðfestir komandi íløgur, so at kommunan framhaldandi kann veita sínum borgarum bestu karmar at virka og liva undir. Tað ljóðar ótrúligt, men satt er, at eingin raðfesting av íløgunum í Tórshavnar Kommunu er viðgjørd politiskt seinast fýra árini. Minnilutin hevur gjørt vart við, at eingin fimm ára íløguætlan er gjørd, sum eigur at verða viðgjørd saman við fíggjarætlanunum, men einki nyttar – eitt heilt valskeið uttan nakra raðfesting av íløgum!

# Dungaskaparroyndin er ikki til nakra nyttu!

PETUR MOHR
Fuglafjørður

Síggi í bløðunum, at summir kvøldskúlar bjóða dugnaskaparroynd í sigling! Lat meg siga beinanvegin, at eg sjálvur tk dugnaskaparroyndina á vetri 2004/5. Tá mann tekur hetta skeið, er luttøkugjaldið høgt. Men tað eru tó nógv hent vitan hjá einum, sum dámar sjólívið, at fáa. Trupulleikin er bara, at tá man fær prógvið, er tað ikki vert eitt tað einasta petti, ikki eingong tað pappír, tað er skrivað á, um man ikki smastundis hevur 12 mánaða siglingstíð.

Tí spyrji eg, hvat meiningin hjá kvøldskúlunum er at bjóða eitt skeið út, sum man ikki kann brúka til nakað, uttan at man hevur siglingstíð?

Og hví gevur tað almenna loyvi til sovorði? Tað er jú ikki bíligt, og tað tekur nógva tíð og orku at gjørnumføra dugnaskaparskeið í sigling!

So um tú ætlar at brúka eitt dugnaskaparskeið, fá tær so fyrst siglingstíð, tí at prógvið er bert galdandi í fimm ár, um tað ikki verður útskrivað til vinnubræv, sum er neyðugt, um man skal kunna brúka tað til nakað!

Ella far aðrastanis t. d. Klaksvíkar og tak sjómansskúlan, og tað kostar einki!

# Rætting um Áland

Í seinnu greinini hjá mær um Áland í blaðnum fríggjadagin er ein feilur komin í. Tað verður sagt, at burðartali hjá føroyskum kvinnum er 2,1 meðan tað er 1,6 í Álandi. Rætta føroyska talið er 2,5. Hetta er tískil munandi hægri enn í øðrum londum í vesturheiminum, har tað hjá teimum flestu er undir 2.

**Óli Jacobsen**

www.sosialurin.fo
Sosialurin – blaðið øll lesa!
Selja bilin?
– set hann í Sosialin!
Hevur tú ein bil til sølu, so er Sosialurin rætti miðilin at lýsa í.
Tú kanst lýsa við og uttan mynd.
Vit seta lýsingina upp fyri teg ókeypis.

Ring og fá ein prís!
Sosialurin
Sosialurin · Postboks 76 · FO-110 Tórshavn

DEKKMASTER.FO
www.dekkmaster.fo
info@dekkmaster.fo
telefon 227 000
GOODYEAR Continental DUNLOP FULDA

Góð og bílig dekk – eisini øll tey kendu merkini
...og nógvar spennandi felgur

| Prísdømi dekk | |
|---|---|
| 175/65-14 | úr **620,-** |
| 195/55-15 | úr **775,-** |
| 195/65-15 | úr **795,-** |
| 205/55-16 | úr **890,-** |
| 205/40-17 | úr **965,-** |
| 225/45-17 | úr **995,-** |
| 225/40-18 | úr **1.290,-** |
| 235/35-19 | úr **1.710,-** |

MICHELIN UNIROYAL PIRELLI BRIDGESTONE

ókeypis.fo
...fá meira fyri einki!
Fær inn á ókeypis.fo og svara nøkrum spurningum og verð við í lutakastinum um góðu vinningarnar!